# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Inn fyri at vinna

**Á pappírinum er HK Slovan Duslo Sala favorittur, men kvinnurnar hjá Stjørnuni eru til reiðar at gera alt, sum stendur í teirra makt, fyri at koma víðari í Europa**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Seinnu árini hevur Stjørnan verið í flokki fyri seg í heimligu kappingini. Stóra avbjóðingin hjá liðnum er tí í Europa, har tær í fjør vóru um reppið at spæla seg víðari*

Tá Stjørnan í fjør fór til Montenegro at spæla EHF-Cup, var tað so sum so, hvørjum roknað varð við.

Úrslitið av dystunum gjørdist tó eitt serstakliga tepurt tap, sum einamest komst av ov stórari virðing í fyrra dystinum og kanska eisini einum dómaraavriki, sum var til fyrimunar fyri heimaliðið.

Sjálvandi er virðingin framvegis til staðar, nú gyltu klaksvíkarkvinnurnar aftur skulu royna seg í EHF-kappingini, men í størri mun tykist vera galdandi, at tær spæla fyri at vinna.

- Sjálvandi gera vit tað. Tú fer altso ikki á vøllin fyri at tapa ella at spæla javnt. Vit spæla í øllum førum fyri at vinna, og tað gera vit eisini bæði friggja- og sunnudagin, sigur Bára Skaale Klakstein, sum er ein av spælarunum á liðnum.

Bára var ikki við á ferðini í fjør, og tí er spenningurin kanska eisini eyka stórur hesaferð.

- Tað er jú hetta, sum vit hava vant fram ímóti. Onkrir smærri steðgir hava verið í venjingunum hjá okkum, men yvir høvur hava vit verið ígongd, síðani kappingin endaði í vár, so kropsliga eru vit so væl fyri, sum til ber. Hinvegin er tað sjálvandi ein vansi, at vit ikki hava havt møguleika at spæla so nógvar dystir, tí føroyska kappingin hevur ligið still, men onkrir venjingardystir hava tó verið. Eitt nú spældu vit tríggjar av slagnum seinasta vikuskifti, sigur Bára.

Um mótstøðuna sigur hon, at tað er avmarkað, hvussu nógv tey kenna til liðið.

- Henrik Gerster (venjarin, blðm.) hevur sæð fleiri videobond, men tær hava havt stórar útskiftingar í hópinum. Men á pappírinum telur liðið fleiri A- og U21-landsliðsspælarar, og í fjør taptu tær tepurt móti donskum liði í EHF-kappingini, so einki er at ivast í, at tær hava eitt sterkt lið.

- Men vit ætla so at spæla okkara kjans. Og vónandi verður tað í eini fullsettari høll, soleiðis at áskoðararnir kunnu bera okkum seinasta pettið uppeftir, sigur Bára.

Liðið hjá Stjørnuni er tó nakað skert undan dystinum. Una Olsen hevur brotið ein fingur, og tí er hon ikki tøk, og væntandi er Joan Midjord Djordjevic eisini úti við skaða í lærinum.

EB/Streymur-ÍF

## Eitt fet í senn

**EB/Streyma-legan hevur verið hálvgum tóm seinastu vikuna, men hóast strævnar landsliðsuppgávur eru spælararnir til reiðar at taka enn eitt fet nærri gullinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sum oddalið var EB/Streymur stórleverandørur til landsliðsleg-urnar farnu vikuna, og hetta hevur ávirkað fyrireikingarnar hjá Sigfríði Clementsen og Magna Mohr, sum hava ábyrgdina av liðnum.

Hóast ikki allir mans vóru í dysti, so merkja ferðingin og fráveran frá vanligu venjingini, at spælararnir kanska ikki hava havt fokus á gullferðini seinastu dagarnar, og fyrsta uppgávan hjá venjarunum er at rætta hetta innaftur.

Og hvussu er og ikki, so er EB/Streymur stórfavorittur á heimavølli. Higar til hevur liðið spælt 10 heimadystir, sum allir eru endaðir við sigri, og sjálvandi verður nú farið eftir nummar 11 av slagnum.

Hjá ÍF er støðan hinvegin, at liðið enn ikki er leyst úr botninum. Við fleiri innanhýsis botnuppgerðum á skránni komandi umførini kann hvørt stig tí gerast lívbjargandi, og tí er einki at ivast í, at tað verður eitt ÍF-lið í verjukendum útgangsstøði, sum fer á vøllin við Margáir sunnudagin.



*Gullið tykist bara koma nærri fyri hvønn heimadyst, sum EB/Streymur spælir*

# Neistin eisini í eldin

Sum tað sást í Sosialinum í gjár, so skal mansliðið hjá Neistanum eisini í altjóða eldin um vikuskiftið.

Neistin spælir her seinna dystin móti Lovcen úr Montenegro, og fyrst og fremst líkist hetta einum møguleika at síggja hondbóltsspæl í altjóða flokki.

Samlaða úrslitið er nevnliga ikki tann heilt stóri spurningurin, eftir at munurin í fyrra dystinum var heili 14 mál.

Mett eftir hesum, so er Lovcen greiður favorittur, men tað er vert at bíta merki í, at talan er um eitt lið, sum er munandi sterkari heima enn úti. Og tí er ikki heilt óhugsandi, at Neistin hevur ein møguleika at gera um seg í dystinum leygardagin.

Eftir dystin í Montenegro varð sagt, at Neistin misnýtti ov nógvar upplagdar møguleikar, og fáast hesir í kassan, samstundis sum verjan stendur væl, so kann talan gerast um spennandi dyst, hóast samlaða úrslitið ikki verður vikað tað stóra.

**-mørk**

